# Minnislepi

## 2 stig til at senda læknaváttan umvegis teldupost

Talgild heilsuskipan

## Stig 1 - Printa læknaváttan út

Fyrsta stigið er at printa læknaváttanina út sum pdf fíla.

Trýst á Udskriv:




> Í nøkrum førum er tað læknaskrivarin, ið tryggjar at læknaváttanin verður send til Almannaverkið.
> Tá ið læknin hevur signerað læknaváttanina kann hann senda boð umvegis messenger í Cosmic, um at læknaváttanin er klár at senda.
> Læknaskrivarin skal tá fylgja hesari mannagongd.

Vel printarin, sum printar til PDF og trýst á OK:



# Minnislepi

## 2 stig til at senda læknaváttan umvegis teldupost

Talgild heilsuskipan

Vel mappuna, sum tú hevur upprættað til læknaváttanir:




Vit viðmæla, at tann sum sendir læknaváttanir fær upprættað sær eina mappu, har man leggur allar pdf-læknaváttanir í, soleiðis at tað er ómakaleyst at leita læknaváttanir fram.

Navngev pdf fílina við p-talinum hjá sjúklingum og trýst á Gem:




Nú er læknaváttaninum printað út sum pdf fíla og liggur í mappuni á tínari teldu.

Næsta stigið er at senda pdf fílina við telduposti til Almannaverkið.

## Stig 2 - Senda teldupostin við læknaváttanini

Næsta stigið er at senda læknaváttanina umvegis tín arbeiðsmeyl.

**OBS!** Má **aldrin** sendast via privatar/persónligar meylar, so sum gmail.com, hotmail.com, olivant.fo o.s.fr. Altso tað **skal** sendast umvegis ein, navn@kl.fo navn@ls.fo ella aðra almenna meyladressu

1. Útfyll Almannaverkið sum móttakara av meylinum HSjournal@av.fo
2. Skriva í Emne hvat slag av læknaváttan talan er um, t.d. LÆ215
3. **Umráðandi** er, at tað bert er ein læknaváttan per teldupost
4. Síðani trýstir tú á vedhæft fil og vel pdf fíluna, sum tú júst hevur printað út




Pdf fílan er nú viðheft og leggur seg í vedhæftet



# Minnislepi

## 2 stig til at senda læknaváttan umvegis teldupost

Talgild heilsuskipan

Telduposturin við viðheftari læknaváttan kann nú sendast, trýst á Send.

